# Grikkar syrgdu fyri sensatiónini

**Við einum 1-0 sigri á verjandi evropameistarunum úr Fraklandi syrgdu grikkar fyri einari sensatión í fjórðingsfinaluni í EM-endaspælinum fríggjakvøldið**

EM-FJÓRÐINGSFINALA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Grikska landsliðið hevur tikið øll á bóli í EM-endaspælinum í Portugal í hesum døgum. Í bólkaspælinum vann liðið á portugisisku vertunum og spældi javnt ímóti spaniólum. Hesi úrslit merktu, at grikkar komu í fjórðingsfinaluna, har mótstøðuliðið var Frakland, ið tey flestu mettu sum mest upplagda boðið upp á evropameistaraheitið undan endaspælinum.

### Grikkar trýstu

Frakland noyddist at verða Arsenal-liðskiparan, Patrick Vieira, fyriuttan, tí at hann hevði ein skaða. Hetta darvaði eisini spælið á franska miðvøllinum, sum ongantíð av álvara kom í gongd í dystinum.

Hjá grikkum var støðan ein onnur, tí teir vóru klárir frá fyrsta bríksli. Liðið hjá týska Otto Rehagel royndi at trýsta fronsku stjørnurnar, og tað eydnaðist teimum eisini. Teir báðir áleypararnir hjá grikkum, Charisteas og Nikolaidis, vóru ógvuliga ágrýtnir, og Fyssas á vinstra vongi syrgdi fyri fleiri vandamiklum bóltum inn í franska brotsteigin.

Í hinum endanum hendi ikki nógv, og tær báðar heimsstjørnurnar, Thierry Henry og David Trezeguet, høvdu ikki nógv at bjóða upp á fríggjakvøldið. Tá ið so eisini Zinedine Zidane leikti undir sítt vanliga støði, var greitt, at útlitini hjá fraklendingum vóru alt annað enn góð.

Tað vóru eisini fleiri, sum hildu, at Grikkaland hevði lagt seg á odda í fyrra hálvleiki, tá ið Barthez bjargaði á sjálvari málstrikuni. Eitt fríspark frá Karagounis var sent væl inn í franska brotsteigin, har Konstantinos Katsouranis var hægstur og skallaði bóltin ímóti franska málinum, men Barthez lá inni í málinum og helt bóltinum á sjálvari málstrikuni.

### Ónøgdir franskir áskoðarar

Tá ið farið var til hálvleiks við støðuna 0-0, vóru teir fronsku áskoðararnir alt annað enn nøgdir. Teir fronsku leikararnir fingu greitt at vita frá sínum áskoðarunum, hvat teir hildu um avrikið í fyrra hálvleiki. Harafturímóti vóru griksku áskoðararnir vælnøgdir, og tað tóktist sum um, at teir vóru farnir at trúgva upp á, at tað fór at verða møguligt hjá grikkum at basa fronsku evropameistarunum.

Fraklendingarnir byrjaðu tó væl í seinna hálvleiki, og í fyrsta minutti av hálvleikinum var nær við, tá ið Thierry Henry skeyt beint við síðuna av griksksa málinum. Tá ið góðir tíggju minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, vóru fraklendingarnir aftur vandamiklir. Veteranurin á vinstra bakki, Bixente Lizarazu, ið leikti sín landsdyst nummar 98, streyk ígjøgnum í vinstru síðu, men bleiv steðgaður í evstu løtu av Mihalis Kapsis. Sami Kapsis var lítla løtu seinni aftur frelsandi eingilin hjá grikkum, tá ið hann fekk skallað burtur á sjálvari málstrikuni.

### Gott sigursmál

Avgerandi løtan í dystinum kom, tá ið 20 minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki. Grikski liðskiparin, Zagorakis, hevði bóltin úti í høgra borði. Hegnisliga lyfti hann bóltin upp um Lizarazu, áðrenn hann sendi eitt væla innlegg inn í franska brotsteigin, har vandamikli framherjin, Charisteas úr týska meistaraliðnum Werder Bremen, var hægstur og skallaði bóltin í mál, uttan at Fabien Barthez í franska málinum hevði nakran møguleika at verja fyri. Eitt mál eftir bókini.

Franski landsliðsvenjarin, Jacques Santini, valdi beinan vegin at seta nýggjar kreftir á liðið. Louis Saha og Sylvain Wiltord komu á vøllin ístaðin fyri David Trezeguet og Olivier Dacourt. Hetta gav franska álopinum eitt sindur meira bit, men sjáldan gjørdist tað serliga vandamikið. Tó var ógvuliga nær við tí einu ferðina, tá ið tíðin var um at verða farin. Thierry Henry slapp rættuliga ótarnaður at skalla bóltin ímóti grikska málinum úr lítlari fjarstøðu, men skallarin streyk beint við síðuna av stongini, og so var sloppið hjá grikkum.

Við sigrinum á fraklendingum hava grikkar av álvara víst, at teir kunnu verða við millum teir bestu. Venjari teirra, týski Otto Rehagel, er eitt taktiskt flogvit, og grikska liðið arbeiðir sum ein eind. Ongar serligar stjørnur eru á liðnum, og tað minnir ikki sørt um danska liðið, sum í 1992 vann evropameistaraheitið í Svøríki. Í hálvfinaluni skulu grikkar dystast við kekkar, og tað verður uttan iva harðasta avbjóðingin hjá grikkunum í kappingini higartil.

**Grikkaland-Frakland 1-0(0-0)**
1-0 Charisteas

# Donsku dreingirnir dumpaðu



*Milan Baros og Pavel Nedved fegnast um, at tann fyrr nevndi hevur søkt danska landsliðið við tveimum málum innan fyri tveir minuttir*

**Vónirnar hjá dønum vóru góðar undan fjórðingsfinaluni ímóti kekkum sunnukvøldið, og tað sá eisini gott út eftir fyrra hálvleik, men eftir steðgin datt danska liðið sundur**

EM-ENDASPÆL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Dreymurin hjá dønum um eina endurtøku av EM-sigrinum í Svøríki í 1992 brast sunnukvøldið, tá ið Danmark noyddist at lúta fyri kekkum, ið vunnu størsta sigurin í teimum fýra fjórðingsfinalunum.

### Ov lítið hugflog

Danska liðið var nakað skert undan dystinum, av tí at Ebbe Sand og Niclas Jensen báðir vóru skaddir og fingu tískil ikki spælt. Danski landsliðsvenjarin, Morten Olsen, hevði valt at seta Kasper Bøgelund á liðið fyri Niclas Jensen, meðan Claus Jensen avloysti Ebbe Sand. At Claus Jensen byrjaði á vøllinum, merkti eisini, at Jon Dahl Tomasson bleiv settur at leika heilt har frammi, meðan Claus Jensen leikti á vanliga plássinum hjá Tomasson beint aftan fyri fremsta mann. Eisini hevði Morten Olsen valt at seta Christian Poulsen úr Schalke 04 á liðið við tí fyri eyga, at hann skuldi mansverja kekkiska stýrimannin, Pavel Nedved úr Juventus.

Í fyrra hálvleiki vóru danir við yvirlutan leikliga, men tað gekk illa við at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Claus Jensen fann seg ongantíð til rættis í leiklutinum sum spælskipari á danska liðnum, og alt ov ofta blivu høgir bóltar sendir inn í kekkiska brotsteigin, og tað var ein løtt uppgáva hjá vælvaksnu kekkisku verjuleikarunum. Danski miðvøllurin tóktist óvanliga stirvin, og hugflogið var ógvuliga lítið.

### Einki móttrekk

Kekkar vóru óivað væl nøgdir við at fara til hálvleik við støðuna 0-0, tí teir høvdu ikki fingið glið á spælið hjá sær, og tørvur var á at fáa tosað tingini ígjøgnum. Seinni hálvleikur var heldur ikki meiri enn nakrar fáar minuttir gamal, tá ið Kekkia legði seg á odda. Eitt hornaspark var sent innfyri, og tá ið Martin Laursen fór skeivur av innlegginum, var tað lætt hjá kekkiska risaáleypparanum, Jan Koller, at seta krúllin undir bóltin og beina hann í netið aftan fyri Thomas Sørensen.

Hetta málið kom dátt við hjá dønum, sum als ikki fingu sítt spæl at koyra eftir steðgin. Alt ov nógvir bóltur vóru mistir út av vøllinum ella sendir beint í beinini á kekkunum, og sum hyggjari framman fyri sjónvarpsskíggjanum sat tú bara og bíðaði eftir, at Morten Olsen fór at skifta út. Tað gjørdi hann ikki, og tá ið eitt gott korter var farið av hálvleikinum, øktu kekkar um leiðsluna. Ein bóltur bleiv stungin inn um donsku verjuna til unga Liverpool-framherjan, Milan Baros, og tá ið Thomas Sørensen kom út ímóti honum, lyfti Baros bóltin hegnisliga upp um Sørensen og í tóma danska málið til 2-0 til Kekkia.

Danska liðið fall nú fullkomiliga í fátt, og samstundis komu kekkar av álvara fyri seg og vístu nakað av tí fótbólti, sum teir eitt nú vístu ímóti Hollandi í bólkaspælinum. Tað gingu eisini bara tveir minuttir, so var aftur útsøla í donsku verjuni, og enn einaferð var tað Milan Baros, ið slapp leysur, og hann setti bóltin í netið og gav harvið dønum mønustingin.

Tað var undrunarvert at síggja, at danski venjarabonkurin einki móttrekk hevði, tá ið kekkar løgdu seg á odda. Claus Jensen úr Charlton hevði snøgt sagt spælt ein vánaligan dyst, og tað tóktist upplagt at seta Peter Madsen úr Bochum inn nógv fyrr á framherjaplássið, og so latið Jon Dahl Tomasson komið aftur á sítt vanliga pláss, har hann er so vandamikil.

Donsku útskiftingarnar komu ikki fyrr enn, at kekkar høvdu lagt seg á odda 3-0, og tá var alt avgjørt, og so kundi tað verið líkamikið.

### Ebbe Sand gevst á landsliðnum

Kekkarnir hava nú spælt seg í hálvfinaluna, har teir skulu hitta Grikkaland. Kekkia hevur helst verið tað liðið, ið hevur verið mest sannførandi higartil undir EM-endaspælinum, og hjá mongum eru teir nú óivað favorittar til at vinna Europameistaraheitið. Liðið hevur eina sterka miðju við monnum sum Poborsky, Nedved, Rosicky og Galasek. Heilt har frammi eru teir báðir Jan Koller og Milan Baros, og í málinum hava teir ein sera góðan málverja í Petr Cech, sum eftir summarfrítíðina skal verja málið hjá Chelsea. Einasti veikleiki á kekkiska liðnum tykist verða verjan, men ofta verður sagt, at eitt gott álop er tann besta verjan.

Nú danska liðið er liðugt í EM-endaspælinum, kunngjørdi Ebbe Sand, at hann gevst á landsliðnum. Ebbe Sand spældi sín fyrsta av 66 landsdystum á vári í 1998, og hann hevur skorað 22 ferðir fyri Danmark. Eisini er nógv, sum kundu bent á, at liðskiparin hjá dønum, Rene Henriksen, fer at takka fyri seg, nú hann er vorðin 35 ára gamal.

**Danmark-Kekkia 0-3(0-0)**
0-1 Jan Koller
0-2 Milan Baros
0-3 Milan Baros

# Eydnan var við Hollandi

**Sviar vóru ómetaliga nær við at spæla seg í hálvfinaluna, men stongin og tvørstongin vóru í vegin, og tá ið avgerðast skuldi frá 11-metrum, vóru tað hollendingar, ið vóru stinnastir.**

EM-FJÓRÐINGSFINALA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fjórðingsfinalan millum Svøríki og Holland leygarkvøldið gjørdist eitt vónbrot leikliga, og tað er lítið at siga til, at tað stóð á jøvnum 0-0 aftan á samfullar 120 minuttir. Hvørki hollendingar ella sviar komu til veruligar málmøguleikar, og flestu vandastøðurnar í dystinum komu eftir deyðbóltar.

### Holland byrjaði best

Tað vóru hollendsku favorittarnir, ið fingu bestu byrjanina upp á dystin. Arjen Robben og Clarence Seedorf høvdu nakrar naskar skotroyndir, ið svenski málverjin, Andreas Isakson, tó vardi fyri, og eitt skot hjá Ruud van Nistelrooy bleiv blokkerað av svensku verjuni.

Fyrsta veruliga svenska roydin upp á mál kom, tá ið Henrik Larsson skeyt eitt gott fríspark, ið tó fór framvið hollendska málinum. Hetta var einasta veruliga svenska royndin upp á mál í fyrra hálvleiki, meðan hollendingar høvdu nakrar. Millum annað hevði Philip Cocu eitt skot, sum Isakson tó fekk boksað út til hornaspark.

Einar tíggju minuttir fyri hálvleik fekk hollendski liðskiparin, Frank de Boer, ein skaða, og hann noyddist tí av vøllinum. Í hansara stað kom Wilfred Bouma úr PSV Eindhoven, ið taldist millum teir fyrstu ellivu hjá Hollandi, tá ið kappingin byrjaði.

### Sviar komu fyri seg

Í seinna hálvleiki gekk tað eitt sindur betur hjá svium við at fáa spælið hjá sær at koyra. Tá ið tíggju minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, var tað eisini nær við, at Svøríki legði seg á odda. Álopsparið, Larsson og Ibrahimovic, høvdu til tá verið nærum ósjónligir, men bráddliga skallaði Larsson tvørtur við hollendska málinum, og tá ið Jaap Stam ikki fekk ruddað burtur, beindi Ibrahimovic bóltin ímóti hollendska málinum, men á sjálvari málstrikuni fekk Philip Cocu sparkað bóltin av vandaleið.

Veruligt lív kom nú í dystin, og fleiri ferðir var heilt nær við, at annað lið fekk lagt seg á odda. Bæði Isaksson í svenska málinum og Van der Saar í hollendska málinum fingu roynt seg, men ongin fekk sett hol á, áðrenn teir 90 minuttirnir vóru leiktir. Tískil var neyðugt at leika umdyst.

### Neyðars sviar

Í umdystinum hendi væl meiri, enn hvat tað hendi í vanligu leiktíðini. Svenski málverjin misti eitt langskot frá Arjen Robben á stongina, men innskifti Roy Makaay fekk ikki fatur á bóltinum, tá ið hann kom út frá aftur. Stutt eftir hetta noyddist Andreas Isaksson at vísa, hvør dugur er í honum, tá ið Clarence Seedorf hevði tvær naskar royndir.

Seinni í umdystinum vóru tað sviar, ið vóru líka við, og teir høvdu uppiborið betur. Henrik Larsson rakti tvørstongina úr góðari støðu, og tá ið bert nakrir heilt fáir minuttir vóru eftir at leika, skeyt Arsenal-leikarin, Frederik Ljungberg eitt gott skot, ið brast í stongina. Men teir 120 minuttirnir fóru aftur um bak, uttan at tað eydnaðist nøkrum av liðunum at fáa mál, og tí var neyðugt at fara undir brotssparkskapping.

### Liðskiparin gjørdist syndarin

Bæði liðini skoraðu upp á fýra av sínum fyrstu fimm royndum. Svenski framherjin, Zlatan Ibrahimovic, ið til dagligt leikar í hollendska Ajax Amsterdam, misnýtti fyri sviar, og hjá Hollandi var tað liðskiparin, Philip Cocu, úr spanska FC Barcelona, ið var syndarin.

Tískil var neyðugt, at liðini skutu eitt brotsspark í part afturat, áðrenn ein vinnari kundi finnast. Svenski liðskiparin, Oluf Mellberg, skeyt fyrst fyri sviar, men Van der Saar bjargaði royndini hjá Aston Villa-verjuleikaranum. Hetta var fyrstu ferð, at Oluf Mellberg skeyt eitt brotsspark í dysti í vaksnamannafótbólti. Tí var tað upp til unga Arjen Robben at senda Holland í hálvfinaluna, og komandi Chelsea-leikarin sveik ikki álitið, men sendi bóltin í mál, og harvið vóru svensku EM-dreymarnir knústir.

Í hálvfinaluni skal Holland dystast við portugisisku vertirnar, og tað vóru óivað ein spennandi dystur við tveimum álopssinnaðum liðum.

**Holland-Svøríki 0-0(0-0) 5-4 eftir brotssp.**



*Ruud van Nistelrooy hálvsfevnur Arjen Robben, eftir at ungi vongleikarin hevur skorað avgerandi brotssparkið, sum sendi Holland í hálvfinaluna*